BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

# Starv sum skúlastjóri
# í Hoyvíkar Skúla

**Barna- og útbúgvingarmálaráðið sóknast eftir skúlastjóra, sum hevur hugsjónir um skúlamenning og áhuga og hegni at átaka sær leiðslustarv í føroyska fólkaskúlanum.**

Starvið sum skúlastjóri í Hoyvíkar Skúla verður lýst leyst til setanar frá 15. september ella so skjótt sum til ber. Í Hoyvíkar skúla eru 349 næmingar í 1. - 9. flokki. Harumframt hevur skúlin serflokk, serliga ætlaður næmingum innan autismuøkið. 16 næmingar eru innskrivaðir í serflokkin. Í skúlanum starvast umframt leiðsluna 35 lærarar, 3 námsfrøðingar, skrivari, húsavørðir og vaskifólk.

**Um starvið**
Talan er um eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, har tú sum skúlastjóri skalt mynda skúlan námsfrøðiliga og fyristingarliga og skipa samstarvið við avvarðandi partar.

Skúlastjórin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans, har høvuðsuppgávurnar eru:

- at standa á odda fyri fakligari og námsfrøðiligari menning og dygd
- at fremja eina mennandi starvsfólkaleiðslu og virka fyri, at starvsfólk skúlans hava umstøður fyri fakligari menning
- at raðfesta námsfrøðiliga arbeiðið og virka fyri trivnaði og góðum samstarvi bæði við atliti at næmingum og starvsfólkum
- at skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- at fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini
- at umsita rakstrar- og fíggjarviðurskifti skúlans

**Samstarvsskipan í Tórshavnar kommunu**
Stjórin samstarvar við mentamáladeildina og trivnaðarfyrisitingina, umframt við aðrar deildir í kommununi. Skipað samstarv er millum skúlaleiðararnar, har dentur er lagdur á, at skúlaleiðararnir í felag virka fyri at menna skúlaskapin í kommununi.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir og skeið ella útbúgving í leiðslu. Skúlaleiðarar skulu sbrt. § 55a í fólkaskúlalógini antin hava tikið ella taka eina góðkenda leiðsluútbúgving.

Persónligir førleikar eru m.a.:

- góð leiðslu- og samstarvsevni
- førleika at taka neyðugar avgerðir
- góðan málførleika, serliga í føroyskum

**Setanarviðurskifti**
Setanarøkið er undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum við fyribils tænastu í Hoyvíkar Skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er flokkað í lønarflokkinum 36.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsókn saman við avriti av læraraprógvi, C.V. og møguligum viðmælum skal verða Barna- og útbúgvingarmálaráðnum í hendi í seinasta lagi **21. august 2023**.

**Umsóknin verður stílað til:**
Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Tinghúsvegur 7
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: bumr@bumr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044.

---

**Barna- og útbúgvingarmálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, gransking barnavernd, barnaheilsu og dagstovnaøkið. Sí heimasíðu ráðsins www.bumr.fo og heimasíðu skúlans www.hoy.fo